# Atlantic vil hava Brugdan

**– Tað tykist løgið, um vit ikki skulu megna flúgving á føroyskum øki, tá vit í løtuni røkja flúgving til bretsk skip, sum liggja sunnan fyri markið, heldur leiðarin á Tyrludeildini hjá Atlantic Airways**

TYRLUFLÚGVING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á Tyrludeildini hjá Atlantic hava tey í hesum døgum úr at gera við at flyta fólk fyri enska felagið, WesternGeco. Talan er um manningarskift á einum supplybáti, sum er staddur 150 fjórðingar sunnan úr flogvøllinum í Vágum, og tá nærkast markið fyri, hvussu nógv longur tyrlan kann flúgva.



*Tvær manningar eru støðugt ígongd, nú 40 mans skulu flytast til og av veitingarskipi hjá WesternGeco*

– Nógv longur enn tað sama koma vit so ikki. Í hesari flúgvin steðga vit á Froðba at bunkra, áðrenn vit leggja leiðina móti skipinum, og somuleiðis verður bunkrað á vegnum heimaftur, sigur leiðarin á Tyrludeildini, Hans Erik Jacobsen.

Arbeiðið hesa ferð fevnir um at flyta 40 mans til og av skipinum. Størsti parturin av manningini er heimahoyrandi í Onglandi, og tí skulu hesir so aftur flúgvast úr Vágum til Aberdeen. Tað kann tykjast heldur kostnaðarmikið, men kortini vann Atlantic hesa avtaluna í kapping við onnur feløg, sum kanska kundu røkt manningarskiftini úr eitt nú Sumburgh í Aberdeen.

**Vilja við í Brugdan**

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit, at danska DanCopter er milum feløgini, sum liggja framvið, nú Statoil velur sær sínar samstarvsfelagar til komandi boringarnar á Brugdan-feltinum.

Tyrludeildin hjá Atlantic Airways er eisini við í kapprenningi um hendan sáttmálan, og Hans Erik dylur ikki fyri, at hann hevur eina vón um, at tað skal eydnast teimum at fáa hesa flúgving eisini.

– Vit halda okkum í øllum førum vera kappingarførar. Tá vit kunnu vinna eina flúgving til skip, sum liggur sunnan fyri okkara sjómark, í fríari kapping við aðrar, so eigur hetta eisini at lata seg gera. Brugdan liggur bara 60 fjórðingar sunnan úr flogvøllinum, so fortreytirnar hjá okkum til hesa flúgving burdu verið munandi betri. Og sum vit hava skilt tað, so er skoðsmálið frá WesternGeco eisini framúr positivt, so vit vóna tað besta, staðfestir hann.

**FORHANG TIL FLEXA SONG**
Ljósareytt/lilla forhang við hjørtum til hálvhøga (uml. 120 cm) Flexasong. Næstan sum nýtt. Til sølu fyri 350,-
*Ring 319618 eftir arbeiðstíð*

**FJARSTÝRT CESSNA FLOGFAR**
Nýtt 4 kanal eldrivið cessna við øllum tilhoyri til sølu fyri 2000 kr.
*Tlf. 214163*

**FLOGBILLETTIR TIL SØLU**
2 returbillettir Vágar-Keypmannahavn biliga til sølu, frá Føroyum 22. mai 2006 úr Danmark 28. mai 2006
*Telefon 216553*

**DANSKA VERJUSKIPIÐ TIL SØLU**
Eitt sera vakurt skip til sølu. Skipið er 109 cm. til ongdar, skipið hevur tríggjar motorar, tríggjar skrúvur og trý róður, og tað hevur eisini eina fjarstýrda kanón, fjarstýring fylgir við í keypinum. Til sølu f yri 5.500 kr.
*Tlf. 279847*

**JARÐARSTYKKI**
í Miðvági til sølu um nóg hóskandi boð fæst - 3921 m2.
*Tlf. 312954*

**LAGURSALG Í VESTMANNA**
Lagursalg verður í Losjuni í Vestmanna 19., 20. og 21. mai. Sera bilig klæðir til kvinnur og børn. Sum f.eks. blusir frá kr. 25,- og buksir frá 35,-

**FRÍTÍÐARMERKIR FRÁ 1950-1960**
Eg sóknist eftir frítíðarmerkjum, brúkt sum óbrúkt, frá Kjølbro, Gjaldstovuni og øðrum feløgum í tíðarskeiðnum 1950 - 1970, alt hevur áhuga. Og rabatmerkir frá FK brúgsunum í Føroyum.
*Tlf. 261670*

**FØROYSK ÁRSMAPPA**
1975/76, og 1 ársmappa frá Grønland 2004 til sølu.
*Tlf. 261670*

**INNRAMMAÐUR MÁLNINGUR**
stødd 97 x 72 eftir Sigmund Petersen til sølu.
*Tlf. 316120*

**TIL SØLU**
Vegna feilkeyp er ein úthurð við síðuparti v/út, óútpakkað til sølu.
*Tlf. 228347*

**FLOGBILLET TIL SØLU**
Føroyar-Keypmannahavn og aftur bíliga til sølu.
*Tlf. 505152*

# Undirsjóvartunnil ímillum Eysturoy og Streymoy avgreiðast í summar

**– Í summar skal politisk avgerð takast um ætlanina at gera undirsjóvartunnil ímillum Eysturoy og Havnina**

UNDIRSJÓVARTUNNIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í summar skal ein politisk avgerð takast um ætlanin at gera undirsjóvartunnil ímillum Eysturoynna og Havnina.

Tað ætlar Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

Á landsstýrisfundi í gjár, var ætlanin at gera undirsjóvartunnil undir Tangafjørð umrødd, men kortini var ongin avgerð tikin.

– Men landsstýrið er samt um at vera vælviljað mótvegis ætlanini, tí hetta er ein verkætlan, sum eigur at vera framd.

Tað er eitt privat initiativ, sum hevur tikið stig til ætlanina og tey hava eisini boðað frá, at privatir fíggingarstovnar eru eisini sinnaðir at fíggja ætlanina.

Landsstýrismaðurin sigur, at hóast talan er um eitt privat initiativ, slepst ikki undan, at Løgtingið má taka støðu til málið, tí tunnilin fer at føra nógvar avleiddar íløgur við sær fyri landið í vegagerð og annað, umframt at finnast skal útav, hvønn veg, farleiðin skal leggjast.



*Nú skal rættilig ferð setast á politisku viðgerðina í sambandi við ætlanina at gera undirsjóvartunnil ímillum Eysturoy og Streymoy. Tekniska fyrireikingarnar eru eisini langt síðani byrjaðar, her verða bora í undirgrundina at taka royndir*

– Spurningurin er eisini, hvørjar treytir skulu setast í projektið.

Hetta er eisini ein verkætlan, sum verður høvuðsferðsluæðrin í Føroyum í framtíðini og tí slepst ikki undan, at Løgtingið tekur støðu til málið.

**Byrjar í aðru viku**

Bjarni Djurholm sigur, at tí fer hann nú at taka málið upp í einum breiðari, politiskum høpi.

Í fyrstu atløgu fer hann at umrøða ætlanina fyri tingfólki í samgonguni og tað arbeiðið fer hann undir longu í aðru viku.

Ætlanin er so at hava eina politiska niðurstøðu í summar, so at eitt uppskot kann leggjast fyri Løgtingið eftir summarferiuna.

– Men hetta er eitt sera stórt og umfatandi mál og tí er tað neyðugt, at tað verður lýst út í æsir, so at vit fáa greiði á, hvørja støðu Løgtingið hevur, áðrenn farið verður ígongd og at vit fáa trygd fyri, at vit fáa gjøgnumført projektið.

Undirsjóvartunnilin ímillum Eysturoy og Streymoy er ein verkætlan, sum kostar 800 milliónir, men eitt privat felag.

Bjarni Djurholm sigur, at felagið, sum arbeiðir við ætlanini hevur sett sær sum mát, at tað skal vera koyrandi undir Tangafirði í 2013 og tað heldur hann er ein rímilig tíðarfreist.

# Kjarnuboringar í fjøruni á Saltnesi

**Kanningarnar til undirsjóvartunnili n millum Skálafjørðin og Havnina eru byrjaðar**

UNDIRSJÓVARTUNNIL
*Lív Reinert*
*liv.reinert.kjeld@sosialurin.fo*

Í fjøruni á Saltnesi eru menn farnir í gongd við kjarnuboringar. Endamálið við kjarnuboringunum er at kanna, hvussu undirlendið er.

Á Saltnesi er ætlanin at bora einar 70 metrar beint niðureftir. Kjarnirnar verða tiknar upp so hvørt, og skulu sendast til jarðfrøðissavnið at verða kannaðar og skrásettar. Teir hava gjørt eina kjarnuboring við Sandvíkarhjalla, og mangla at gera tvær afturat hesari á Saltnesi; eina á Raktanga, og eina á Strondum.

Í dag høvdu teir boráð einar 17-18 metrar niður; um alt gongur sum ætlað, verður kjarnuboringin á Saltnesi liðug um einar tvær vikur.



*Í fjøruni á Saltnesi eru menn farnir í gongd við kjarnuboringar*